almannaverkið

# Umsókn um endurgjald fyri inntøkumiss

vegna likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku hjá barni undir 18 ár
sambært § 25 stk. 1. 1) í lóg um almannatrygd og tænastur

**Upplýsingar umsøkjarans**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Navn | | | | P – tal | |
| Gøta | | | | Telefon | |
| Býur | | Postnr. | | Fartelefon | |
| Teldupostur | | | | | |
| Kommunulækni | | | | | |

**Barnið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navnið á barninum, ið ber brek/hevur varandi sjúku, og sum umsóknin snýr seg um: | | | |
| Navn | | P – tal | |

**Orsøk til umsóknina**

| | |
|---|---|
| Stutt um orsøkina til, at tú søkir um endurgjald fyri inntøkumiss | |

**Arbeiðsgevari**

| Navn | Bústaður | Teldupostur |
|---|---|---|
| | | |

**Setanarviðurskifti**

| Starv | Sáttmáli | Lønarstig |
|---|---|---|
| | | |

**Møgulig veiting skal flytast á hesa kontu:**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skrás.nr. | | Kontunummar | | Peningastovnur | |

**Konta til bundna eftirlønaruppsparing**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skrás.nr. | | Kontunummar | | Peningastovnur/ tryggingarfelag | |



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

# Umsókn um endurgjald fyri inntøkumiss

vegna likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku hjá barni undir 18 ár
sambært § 25 stk. 1. 1) í lóg um almannatrygd og tænastur

**At leggja við umsóknarblaðnum**

| | |
|---|---|
| Váttan frá arbeiðsgevara um inntøkumissin | |

**Váttan**

Undirritaði/a váttar, at upplýsingar, latnar í og saman við hesum umsóknarblað, eru sannar. Eg bindi meg til at siga Almannaverkinum frá broytingum í mínum viðurskiftum, sum kunnu væntast at hava við sær, at rætturin til veitingina fellur burtur.
Samstundis loyvi eg Almannaverkinum at útvega upplýsingar um míni viðurskifti – herundir frá lækna um sjúkuna og frá arbeiðsgevara og skattamyndugleika um inntøkuviðurskifti, gerst tað neyðugt fyri málsviðgerðina at útvega fleiri upplýsingar.

| Dagfesting | Undirskrift |
|---|---|
| | |

**Umsóknin skal sendast ella latast Almannaverkinum.**



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

# Umsókn um endurgjald fyri inntøkumiss

vegna likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku hjá barni undir 18 ár
sambært § 25 stk. 1. 1) í lóg um almannatrygd og tænastur

## Kunning

**Inntøkumissur - endurgjald**
Endurgjald fyri inntøkumiss er ein fyriskipan, sum er ætlað foreldrum ella øðrum, sum mugu vera heima hjá børnum vegna sjúku ella brek

**Heima hjá børnum vegna brek ella sjúku**
Hvør kann fáa endurgjald fyri inntøkumiss?
Tá ið barn ber brek ella hevur varandi sjúku kann henda, at barnið ikki fær verið á stovni, ella at tað má vera heima í styttri ella longri tíð. Hetta kann hava við sær, at annað ella (hendingaferð) bæði foreldrini mugu frá arbeiði í styttri ella longri tíð, og tá er møguligt at fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.
Endurgjald kann eisini verða veitt, tá ið talan er um

- fráveru í sambandi við sjúkrahúsuppihald í Føroyum ella uttanlanda
- frávera í samband við viðgerð hjá barninum
- fráveru tí barnið orsakað av brekinum ella sjúkuni, bert kann vera á dagstovni, dagrøkt ella skúla parttíð
- partvísa fráveru, tí barnið krevur so nógva umsorgan, umsjón og hjáveru alt samdøgrið, og at tað tí er neyðugt, at annað av foreldrunum er heima frá arbeiði, sjálvt um barnið er í dagansing ella skúla. T.d. tá ið talan er um fjølbrekað barn

**Treytir**
Tað er altíð ein fyritreyt fyri at fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, at møguleikin at ansa barninum á dagstovni, dagrøkt ella hjá Trivnaðardeplinum er troyttur fult út, eins og at skúlin hevur skipað skúlagongdina og undirvísingina við atliti at fortreytum hjá barninum.

**Endamálið við endurgjaldi fyri inntøkumiss**
Sum grundarlag fyri at veita stuðul ger Almannaverkið, í samráð við foreldrini ella onnur, ið uppihalda barninum, eina heildarmeting av ítøkiliga tørvinum og fyritreytunum hjá barninum og familjuni. Endamálið við stuðlinum er at linna og fyribyrgja, at støðan hjá barninum versnar, og at stuðla og lætta um hjá familjuni at uppihalda barninum heima við hús. Útgangsstøðið er, at familjan hevur ábyrgdina. Tað almenna stuðlar familjuni at lyfta hesa ábyrgd.

**Upphæddin sum verður útgoldin**
Endurgjald verður sum meginregla veitt við støði í inntøkugrundarlagnum seinastu 12 mánaðirnar fyri fráveruna. Endurgjald kann í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og bundið eftirlønargjald sambært løgtingslóg um eftirløn.
Í sambandi við fráveru frá arbeiði orsakað av brekinum ella sjúkuni hjá barninum, kann endurgjald veitast fulla tíð, parttíð ella ávísar dagar.
Verður veitt endurgjald fyri fulla tíð, kann endurgjald í mesta lagi vera 25.000 kr. Eisini hóast inntøkan áðrenn fráveruna var hægri enn 25.000 kr.
Er talan um parttíðar endurgjald, kann samlaða inntøkan, íroknað endurgjald frá Almannaverkinum, í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin. Um vanliga inntøkan eitt nú er 20.000 kr., kann endurgjaldið frá Almannaverkinum í mesta lagi vera 5.000 kr.
Er talan um endurgjald fyri ávísar dagar, kann inntøkan, íroknað endurgjald frá Almannaverkinum, í mesta lagi vera 25.000 kr. um mánaðin. Um vanliga inntøkan er 30.000 kr. og frávera er neyðug nakrar dagar og inntøkan tí fer niður á 26.000 kr. er ikki møguleiki fyri endurgjaldi.
Møgulig sparing í barnaansingargjaldi ger at útgjaldið lækkar samsvarandi.
Frítíðarløn verður mótroknað í útgjaldinum í apríl
Inntøkumissur verður útgoldin mánaðarliga og er á kontu fyrst í eftirfylgjandi mánaði. Tað merkir at inntøkumissur fyri januar er á kontu fyrst í februar. Hetta skyldast at Almannaverkið skal kunna mótrokna møguliga inntøku, áðrenn útgoldið verður.



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo